# GBOB - menningin sigraði

**GBOB verður aftur í Føroyum næsta ár, tað væntar væl nøgdi fyriskiparin Jón Tyril, sum gleðist um høga støðið í føroyskum tónleiki.**

**GBOB**

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



*Ikki minst fegnaðust fyrireikararnir um stóra fjølbroytni, sum GBOB-kappingin vísti*

Jón Tyril úr G!Music, ið skipaði fyri føroysku útgávuni av GBOB, var ræðuliga væl nøgdur við tiltakið, tá vit prátaðu við hann sunnudagin. Hann segði, at áskoðaratalið var nøktandi, hóast tað ikki var útselt nakað av kvøldunum. Fólk vóru glað, og hølini kendust ongantíð tóm.

Hóast talan var um kapping, so segði hann, at hann merkti einki til nakran illvilja, ella neiligan kappingarhuga. Heldur ikki millum tónleikararnar. Har var ein feel good kensla, eitt sindur sum á G! sigur Jón. Hetta er við til at menna føroyskan tónleik, og hann heldur, at tú føldi á tónleikarunum, at teimum dámdi væl at luttaka.

Hann heldur, at tiltakið var so væl eydnað, at hetta væntandi verður gjørt aftur næsta ár.

### Øgiliga fjølbroytt

Hann frøddist almikið um fjølbroytni og helt, at tað var frálíkt, at t.d ein bólkur sum Moja valdi at luttaka, tí hetta gav kappingini nakað heilt annað. Eitt ordiliga positivt ískoyti, við ordiliga etableraðum tónleikarum, "...og sangarindurnar tær hava sungið, síðan eg var smádrongur, sigur Jón". Tær fara á sama pall sum ungir punkbólkar, sum bara koyra beint fram og umhugsunarsamur popprokkur, sum tann hjá Mariusi, tað gerst ikki nógv meira fjølbroytt enn hetta.

Eisini útlendsku dómararnir vóru væl nøgdir og hildu, at alir tólv finalu bólkarnir vóru ordiliga góðir. Bæði útlendsku og føroysku dómararnir hava skriva viðmerkingar um hvønn bólk í sær, og hesar verða nú savnaðar og sendar til bólkarnar.

### Framtíðin sær bjørt út

Nógvir nýggir bólkar luttóku í ár, og Jón heldur, at her er talan um nógv stór talentir, Hetta søgdu dómararnir eisini. Jón heldur serliga, at bólkurin Skunk var eitt stórt og jaligt yvirraskilsi, eitt slag av útrykksfullum og sterkum punkbólki, sum kann fáa eina stóra framtíð.

# Nógv nýtt føroyskt

**Hópin av nýggjum føroyskum tónleiki er á listanum, og aftur í ár kunnu nógv vænta, at hørðu pakkarnir undir jólatrænum eru føroyskar fløgur**

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Uppundir jól kemur altíð nógvur føroyskur tónleikur út, og hetta setur dám á sølulistanum hjá Føroya størsta fløguhandli 3'aranum. Aftur hesa vikuna er tað savnsfløgan Popplist 4, ið liggur ovast á listanum. Popplist 4 hevur ligið á ovastu rók, líka síðan hon kom út. Við landaplágum sum Forever and Beyond hjá Makrel, 1 veittiii hjá Orkestriiinum her vestriii og Muscleman blað hjá 200, eru sølutølini støðugt vaksandi.

Sum árini ganga hjá Hjalta Skaalum var á øðrum plássi í síðstu viku, men er hesa vikuna dottin niður á sjeynda pláss, og Poppkorn, sum lá á triðja plássi við Sjeikinum, eru dotnar niður á áttanda pláss. Báðar hesar fløgur komu út og inn á listan í síðstu viku.

Tríggjar nýggjar føroyskar fløgur koma inn á listan. Nýggja fløgan hjá Anniku Hoydal Til børnini hjá børnunum er ikki heilt óvæntað á øðrum plássi, meðan sølan av Einki uttan Jesus við Heina Lützen hevur tikið dyk á seg og fløgan liggur á fjórða plássi. Perlurnar hjá Dynamitt eru komnar inn á fimta pláss.

Útlendsku fløgurnar, ið eru á listanum, eru nýggja fløgan hjá Madonnu, og tær tríggjar Now savnsfløgurnar Now That's What I Call Music 14, Now Big Hits 2005 og Now Christmas 2005.

# Lena hevur úr at gera

Sera nógv er á skránni hjá Lenu í løtuni, í síðstu viku var Lenu tónleikagestur á P4, ið er næst største danska útvarpsstøðin. P4 vendir sær til ein vaksnan lurtaraskara. Lena spældi live í eini sending.

Hesa vikuna ferðast hon kring Danmark og vitjar aðrar av teimum størru útvarpsstøðunum. Umframt, at hon er á konsertferð við amerikansku songkvinnuni Beth Hart, tær spæla fyri útseldum hølum kring alt Danmark.

**nud**

# 1000 sms á netinum

**Fyrsta lagið hjá The Message er lagt á heimasíðuna hjá bólkinum, og endiliga sleppa føroyingar at hoyra henda so sera hemmiliga bólk**

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Nýggi super bólkurin við øllum teimum nógvu penu tónleikarunum "The Message" gevur sum áður sagt útgávuna »1000 sms« út hósdagin 24. november. Men longu nú er heitislagið tøkt á heimasíðuni: HYPERLINK w w w . 1 0 0 0 s m s . f o www.1000sms.fo.Tónleikurin er glaður poppur sungin á føroyskum, við fittum teksti, tað riggar ordiliga væl og er eitt nýbrot í føroyskum tónleiki.

Bólkurin skrivar í tíðindaskrivi: "Vit halda tað vera í lagi at lata lagið leka út, tí vit vænta, at tú verður í góðum lag av tí!

Okkara fatan er, at tú ikki byrjar eina búrmáltíð við høvuðsrætti ella desert, og tí hava vit valt at borðreiða við heitislagnum, ið er ein lǽttur undanrættur, sum mest av øllum er merktur av tónleikaligum meginstreymi. Lagið snýr seg um nakað so gerandisligt og samstundis so sterkt sum kærleika; ella »Long Distance Relations« sum vit hava valt at rópa søguna í sanginum.

Okkum fýra dámar so nógv ymiskt; til dømis Coldplay, Manic Street Preachers og Maroon 5. Men eitt hava vit, sum eru í aldrinum 17 til 25, í felag: At einki er betri enn at vera forelskaður! Tá ið tað snýr seg um hetta, ræðast vit hvørki fangandi mainstream-popprokk ella tugdar hugmyndir, latnar í lagfagran, lǽttan og fangandi tónabúna, ið er ljóðblandaður lýtaleyst og lekkurt. Tí í hesum sambandi eru vit sum øll hini!

Sjálvir halda vit lagið vera einfalt og ærligt. Her er eingin attituda, latin í ovurdimensjóneraða orku. Og her er heldur ikki fetichisma, skrøggutur sjónleikur ella smøl fjepparaflokking. Men kanska er tað júst teksturin, sum goymir einfalda gloypibitan. Ja, kanska eru boðini frá okkum fýra til øll onnur, at vit altíð kunnu senda sms og harvið ongantíð vera einsamøll og hjálparleys. Vónandi hava vit við støði í hesum boðskapi gjørt eina landaplágu!

Søgan um sangin »1000 sms« er annars serlig. Høvuðspersónurin, Janus Rasmussen, var sjúkur, og hinir sótu og jammaðu. Teir tríggir spældu síðan lagið fyri Janusi ígjøgnum telefonina. Stutt eftir sendi hann teimum tekstin í einum sms-boðum, og á hendan hátt var hugskotið kveikt. Sum okkara sera krímsjúki Janus tók til í telefonini:

- Hvat er beira datúrligt edd ad sedda bidst túsudd sms til hada, tú elskar"

